Fylgiskjal 10.

**Nella Festirstein**

**Fra:** AAA001@politi.dk
**Sendt:** 26. november 2018 10:14
**Til:** Nella Festirstein
**Emne:** SV: Lógaruppskot til ummælis - Tilhaldslógin

Góðan morgun, Nella
Vegna Føroya Politistafelag skal eg siga frá, at vit hava ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.
Vinarlig heilsan,
Absalon Áargarð,
formaður

Føroya Politistafelag
**(Færøernes Politiforening)**

Yviri við Strond 17, FO-100 Tórshavn
Tlf. +298 351448 (lok. 5600)
Mobil +298 284882

**Fra:** Nella Festirstein [mailto:nellaf@tinganes.fo]
**Sendt:** 29. oktober 2018 09:07
**Til:** hem@sorinskrivarin.fo; Kølbæk, John (JKO017); Elkin.Klettheyggj@kriminalforsorgen.dk; Mentamálaráðið; Almannamálaráðið; Heilsu- og innlendismálaráðið; bardurl@setur.fo; kf@kf.fo; LUM Postur til Stovnin; AV Almannaverkið; petersen@adv.fo; mail@psykolog.fo; Elin Winther Poulsen; kris@kris.fo; barnabati@barnabati.fo; post@kvinnuhusid.fo; bvs@bvs.fo; javni@javni.fo; lararaf@lararafelag.fo; pedagog@pedagogfelag.fo; Áargarð, Absalon (AAA001); megd@megd.fo; amnesty@amnesty.fo; GIGNI Postur til Stovnin; srfelag@gmail.com
**Emne:** Til ummælis. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin) (Bráðfengis frástøðuboð sett inn og orðið "tilhald" broytt til "frástøðuboð"). Ummælisfreistin er 26. november.

Hjáheft verður sent tykkum til ummælis *Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin) (Bráðfengis frástøðuboð sett inn og orðið "tilhald" broytt til "frástøðuboð")*

**Freistin at senda ummæli er mánadagin 26. november.**

Ummæli skal sendast til nellaf@tinganes.fo

**Broytingarnar í stuttum**

Løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin) varð samtykt av Løgtinginum í tingsetuni 2016 og kom í gildi 1. apríl 2017.

Í hesum uppskotinum verður gjørdar tvær broytingar:

*1. Nýtt orð: Frástøðuboð*

Undir viðgerðini í tinginum av Tilhaldslógini vóru fleiri tingfólk, sum hildu, at orðið "tilhald" ikki var eitt nóg sigandi og føroyskt. Sambært § 1 í løgtingslógini er tilhald eitt revsiálagt forboð um at leita upp ein annan persón antin persónliga, munnliga ella skrivliga, her uppi í eisini við elektroniskum samskifti, ella á annan hátt at seta seg í samband við ella elta ein annan.

Lógartænastan fekk í mars 2017 nøkur uppskot um annað orð fyri "tilhald" frá Marjun Arge Simonsen, málfrøðingi. Uppskotini vóru send Málráðnum, sum var biðið um at siga sína hugsan. Í september 2017 svaraði Málráðið, at starvsnevndin hevði viðgjørt fyrispurningin um annað orð fyri tilhald í løgfrøðimáli, og har var semja um at viðmæla frástøðuboð, sum er eitt av uppskotunum hjá Marjuni Arge Simonsen, tí hildið varð, at tað innihaldsliga hóskar væl við skilmarkingina av hugtakinum.

Skotið verður upp at broyta "tilhald" til "frástøðuboð".

*2. Bráðfengis frástøðuboð*

Broytingin heimilar Fútanum at taka fyribilsavgerð um frástøðuboð (bráðfengis frástøðuboð), sum fyri fyrst skal verja órættaða og møgulig húsfólk hjá órættaða, inntil Fútin kann taka eina endaliga avgerð um frástøðuboð ella uppihaldsforboð. Bráðfengis frástøðuboð hevur sama rættarvirknað sum vanligt frástøðuboð eftir Tilhaldslógini.

Munurin er serliga, at vanligu illgrunakrøvini, t.e. grundaður illgruni, fyri at kunna áleggja tilhald eru linkað; hetta er fyri at tryggja skjóta vernd av órættaða. Broytingin inniber, at fyribils tilhald kann verða álagt, um ein persónur við rímiligari grund er undir illgruna at valda einum øðrum ónáðir, at tað eru ávísar orsøkir eru at halda, at viðkomandi framhaldandi fer at volda hinum ónáðir, og at viðkomandi ikki hevur ein rímiligan áhuga í at seta seg í samband við hin persónin.

**Uppskotið er sent beinleiðis til:**

- Føroya rætt
- Føroya landfúta
- Kriminalforsorgina
- Mentamálaráðið
- Almannamálaráðið
- Heilsu- og innlendismálaráðið
- Føroya Kommunufelag
- Barnaverndarstovu Føroya
- Barnaumboðið
- Føroya Fróskaparsetur
- Almannaverkið
- Gigni
- MEGD
- Javna
- Føroya advokatfelag
- Føroyskir sálarfrøðingar
- Sosialráðgevarafelagið
- Føroya lærarafelag
- Føroya pædagogfelag
- Føroya politistafelag
- Sig Frá
- Amnesty International
- Kris
- Barnabata
- Kvinnuhúsið

Uppskotið er eisini lagt alment út á ummælisportalin hjá Føroya landsstýri, so øll hava møguleika at senda inn ummæli.

Vinarliga

Nella Festirstein
Deildarstjóri

Løgmansskrivstovan
Lógartænastan
Beinleiðis tlf: +298 55 80 76

Uppskotið er eisini lagt alment út á ummælisportalin hjá Føroya landsstýri, so øll hava møguleika at senda inn ummæli.

Vinarliga

Nella Festirstein
Deildarstjóri

Løgmansskrivstovan
Lógartænastan
Beinleiðis tlf: +298 55 80 76